# VIT GEVA IKKI UPP




**GRINDADRÁP** Umhvørvisstríðsmaðurin Paul Watson lovar, at hann heldur fram við stríðnum ímóti grindadrápinum í Føroyum, og hann roknar við, at hann fyrr ella seinni klárar at steðga føroyingum í at drepa grind

» Grindadrápið er barbariskt, og tit offra heilsuna hjá tykkara børnum

Eyðun Klakstein

Umhvørvisfelagsskapurin Sea Shepherd hevur nú aftur gjørt um seg í Føroyum. Hesaferð hevur eitt umboð fyri felagsskapin verið í Føroyum og sneytað, og ein frágreiðing um grindadrápið í Klaksvík mánamorgunin, sum ikki alla tíðina gekk so væl, er løgd á heimasíðuna hjá felagsskapinum og send út til folk í eystri og vestri.

Oddamaðurin fyri Sea Shepherd er nú sum áður Paul Watson, sum føroyingar hava havt vitjan av nakrar ferðir. Hann hevur verið í stríði við føroyingum um grindadrápið, men nú er eru fleiri ár liðin, síðani hann sjálvur var í Føroyum seinast.

Men hann hevur langt frá gloymt Føroyar, og hann hevur eisini verið uppi í seinasta átakinum hjá Sea Shepherd í Føroyum.

- Okkara ætlan var at dokumentera grindadrápið og kunnu avdúka tað enn einaferð, og tað gera vit fyri framhaldandi at leggja trýst á føroyingar. Vit hava gjørt ein film um delfindrápið í Japan, og vit royna at gera nakað tað sama við grindadrápinum í Føroyum, sigur Paul Watson.

## Gloymir ikki Føroyar

Hóast áralangt stríð ímóti grindadrápinum hevur tað ikki eydnast Paul Watson at broyta hugburðin hjá føroyingum til grindadrápið, og undirtøkan fyri drápunum eru framvegis ovurhonds stór millum føroyingar – tað sæst hvørja ferð grindadráp er.

Hetta fær tó ikki Watson at geva skarvin yvir.

- Vit hava stríðst ímóti grindadrápinum í Føroyum síðani 1983, og stríðið heldur fram. Eg eri í grundini ikki kløkkur av hesum seinastu myndunum, men eg eri ovfarin av, at føroyingar framvegis eta grind, tí tað er so nógv kyksilvur í grindini, at hon skaðar heilsuna hjá tykkum, sigur hann.

- Eg umhugsi at koma aftur til Føroya at stríðast ímóti grindadrápinum. Í løtuni eru vit í Antarktis, men vit halda fram við stríðnum ímóti grindadrápinum eisini, og eg kann bara siga, at Føroyar standa altíð á mínum lista. Eg havi vónir um, at vit einaferð megna at steðga føroyingum í at drepa grind. Tað mátti eisini verið fyri tykkara egna besta, tí grindin er skaðilig at eta.

## Barbariskt

Sea Shepherd brúkar nógv litað lýsingarorð um føroyingar og grindadrápið, og spælt verður upp á kenslurnar í seinastu frágreiðingini, sum er komin frá felagsskapinum. Oddamaðurin í Sea Shepherd smæðist heldur ikki burtur, tá hann skal tosa um grindadrápið og føroyingar.

- Grindadrápið er barbariskt, og tit offra heilsuna hjá tykkara børnum, tá tit geva teimum grind at eta.

Kanska drepa føroyingar grindahvalir til stuttleika. Eg veit bara, at grindadrápið er fullkomiliga láturligt. Tað er nakað av tí mest barbariska og vemmiliga, sum eg nakrantíð havi upplivað, og eg dugi ikki at skilja, at tað kann halda fram, sigur Paul Watson.

*eydun@sosialurin.fo*

*- Eg eri í grundini ikki kløkkur av hesum seinastu myndunum, men eg eri ovfarin av, at føroyingar framvegis eta grind, tí tað er so nógv kyksilvur í grindini, at hon skaðar heilsuna hjá tykkum, sigur hann, sigur Paul Watson við Sosialin*

## Fakta

**Navn:** Paul Watson
**Aldur:** 59 ár
**Føðistaður:** Toronto, Kanada

Watson var virkin í Greenpeace, men var koyrdur úr felagsskapinum í 1977.

Stovnaði sín egna umhvørvisfelagsskap, Sea Shepherd, í 1978

Virda amerikanska blaðið Time Magazine valdi hann í 2000 til ein av umhvørvishetjunum í 20. øld